| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 26. mai 2011 |
| Býráðsfundur nr. | 05/2011 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2011 tann 26. mai kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 19. mai 2011 um innkalling til fundar. Gordon M. Petersen møtti fyri Jann Toftegaard, sum hevði boðað frá, at hann hevði forfall til fundin. Kristina Toftegaard Larsen møtti ikki á fundinum, men gingið verður út frá, at hon hevur forfall vegna sjúku.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Gordon M. Petersen
Elisabeth D. Eldevig
Eyðun á Lakjuni
Magnus Midjord
Petur Abrahamsen
Sonni á Horni

Við á fundinum luttók eisini Marin S. Thomsen, meðan mál nr. 12/2011 varð til viðgerðar og avgerð tikin.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 12/2011.**

**Mál viðvíkjandi roknskapi kommununar fyri 2010.**

Fuglafjarðar kommuna hevur tann 18. mei 2011 móttikið grannskoðaðan roknskap fyri kommununa saman við grannskoðarafrágreiðing fyri 2010 frá P/F Grannskoðaravirkinum INPACT, undirskrivaður av Fróða Sivertsen, statsaut. revisor og Snorra á Bøgarði, skrásettum grannskoðara.

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 19. mei 2010 gjøgnumgingið roknskapin og grannskoðarafrágreiðingina saman við fíggjarleiðaranum Marini Thomsen og Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara og samanhildið roknskaparøkini saman við fíggjarætlan kommununar fyri 2010.

Ein eykajáttan er framd í árinum úr bólki 7 til 4, og er eykajáttanin kunnað Fíggjarmálaráðnum við skrivi, dagfestum 17. desember 2010.
Roknskapurin vísir eitt rakstraravlop upp á kr. 884.234,00.

Sambært høvuðsyvirliti í roknskapinum eru útgreiningarnar hesar og samanhildnar í mun til góðkendu fíggjarætlanina við framdari eykajáttan í árinum:

| | Kontoheiti: | Roknskapur: | Fíggjarætlan | Munur +/- |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Kommunal fyrisiting | -6.976.994,00 | -7.489.030,00 | -512.036,00 |
| 2 | Almanna- og heilsumál | -3.937.791,00 | -4.551.500,00 | -613.709,00 |
| 3 | Børn og ung | -8,792,403,00 | -8.359.200,00 | 433.203,00 |
| 4 | Undirvísing | -3.883.536,00 | -3.730.500,00 | 153.036,00 |
| 5 | Mentan og frítíð | -3.347.256,00 | -3.532.681,00 | -185.425,00 |
| 6 | Teknisk mál | -4.357.193,00 | -4.513.000,00 | -155.807,00 |
| 7 | Kommunal virki | -491.729,00 | -1.484.218,00 | -992.489,00 |
| 1-7 | **Økið 1-7 tilsamans** | **-31.786.903,00** | **-33.660.129,00** | **-1.873.226,00** |
| 20 | Rentukostnaður-netto | -2.842.743,00 | -2.695.750,00 | 146.993,00 |
| | **Økið 1-7 tilsamans** | **-34.629.646,00** | **-36.355.879.,00** | **-1.726.233,00** |
| 1-7 | Íløgur – studning 1-7 | -1.555.774,00 | -1.520.000,00 | 35.774,00 |
| | **Samanteljing** | **-36.185.420,,00** | **-37.875.879,00** | **-1.690.459,00** |
| 25 | Avdráttir av lánum | -8.662.904,00 | -6.654.913,,00 | 2.007.991,00 |
| | **Samanteljing** | **-44.868.324,00** | **-44.530.792,00** | **317.532,00** |
| 20 | Skattainntøkur | 45.732.558,00 | 44.532.133,00 | -1.200.425,00 |
| | **Fíggjarúrslit** | **884.234,00** | **-1.341,00** | **-882.893,00** |

Annars eru fløgurnar útgreinaðar á blað síðu 7 í grannskoðaða roknskapinum.

Býráðið hevur annars samtykt eykafíggjarjáttan fyri tilsamans kr. 675.000,00 í árinum, og er henda, sum nevnt frammanfyri, fráboðað Fíggjarmálaráðnum, hetta sambært § 53, stk. 2.3. í løgtingslóg nr. 67 frá 17. mei 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin).

***Býráðið/fíggjarnevndin er somuleiðis skrivliga kunnað um av fyrisitingini, at ein eykajáttan í flestu førum førir eina útreiðslu við sær, sum beinleiðis ávirr roknskap kommununar fyri 2010. Eykajáttanin er víst niðanfyri.***

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Øki** | **Framd eykajáttan:** | | **Upphædd:** | **Fígging:** | | **Endamál:** |
| | | | | | | |
| 4 | Undirvísing | | -675.000,00 | Økisflytan frá 7 | | Rakstur |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | **-675.000,00** | | | |

Eingin lántøka er framd í 2010.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini 19. mai 2011 og mælir nevndin einmælt býráðnum til at góðkenna grannskoðaða roknskap kommunununar fyri 2010 uttan viðmerkingar. Grannskoðarafrágreiðingin verður send býráðslimum í trúnaði saman við málinum.

**Avgerð;**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og góðkenna roknskap kommununar fyri 2011, og sum kunnaður verður Fíggjarmálaráðnum, hetta sambært § 53, stk. 2 1) í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, somuleiðis sum farið er fram um at farið er fram eftir § 38, stk. 2 4) í somu lóg. (8-0).

**Mál nr. 13/2011.**

**Umbøn frá Fuglafjarðar skúla um eykajáttan til samvirknar talvur.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá skúlasjóranum við Fuglafjarðar skúla, dagfest 11. mai 2011 um at veita skúlanum eina eykajáttan til keyp av samvirknum talvum til skúlan, grundað á at eigin játtan er til tílíkt keyp á fíggjarætlan kommununar fyri 2011, soleiðis at hesar kunnu verða klárar til nýtslu komandi skúlaár.

Um ikki, so verður heitt á kommununa um at taka henda tørv við í komandi fíggjarætlan, t.v.s. fyri fíggjarárið 2012.

Greitt verður frá, ar samvirknar talvur eru seinnu árini vornar ein náttúrligur partur av einhvørjari skúlastovu. Hesar talvur lata upp fyri nýggjum møguleikum, og kunnu gera undirvísingina meira nútíðarhóskandi og viðkomandi.

Fuglafjarðar skúli hevur 9 slíkar talvur í skúlanum. Tríggjar eru í barnaskúlanum, 5 í framhaldsdeildini og ein í lívfrøðistovuni. Ynskiligt hevði verið at fingið samvirknar talvur í nærum allar stovur í skúlanum.

Talan er tá um eini 13 talvur afturat. Í 2009 var nakað av peningi settur av til samvirknar talvur. Tá keypti skúlin 4 talvur. Í 2010 og 2011 er eingin peningur settur av til hetta endamál, og tí kann fígging ikki finnast innan verandi karmar.

Samvirkna talvan er eitt vanligt undirvísingaramboð í dag.

Skúlanum kunnugt eru vit einasti skúli í Eysturoynni og Norðoyggjum, sum ikki hevur hesar talvur í øllum stovum. Eftir summarsteðgin má skúlin eisini gera nakrar flytingar í floksstovum sum gera, at flokkar, sum eru vanir við samvirknar talvur, nú mugu fara aftur til krittalvur.

Forkvinnan í mentamálanevndini hevur við teledupostí spurt skúlastjóran, um hvussu nógvar talvur, talan er um í sambandi við, at skúlin kemur at gera nakrar flytingar í floksstovunum, sum gera, at flokkar, sum eru vanir við samvirknar talvur, nú myugu fara aftur til krittalvur.

Í teldupostí frá skúlastjóranum, dagfestur 16. mai 2011 verður upplýst, at talan er um 3a flokk, 4. flokk, 9c flokk, 10a og 10b flokkar ella tilsamans 5 talvur.

Mentamálanevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 16. mai 2011 og mælir fíggjarnevndini/býráðnum til at 5 samvirknar talvur verða keyptar til skúlan í inniverandi fíggjarári, og at heitt verður á fíggjarnevndina/býráðið um at veita eina eykajáttan til keyp og monteran av hesum 5 talvum fyri ein mettan kostnað upp á kr. 25.000,00 fyri stykkið ella tilsamans kr. 125.000,00, hetta vísandi til § 41, stk. 1 og 2 í í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri.

Nevndin varð samd um, at heitt verður á í minsta lagi 2 veitarar um at koma við tilboði upp á talvurnar og montering.

Nevndin varð somuleiðis samd um at arbeiða fram ímóti , at peningur verður avsettur á fíggjarætlan kommununar fyri 2012 til keyp av teinmum írestandi 9 samvirknu talvunum til Fuglafjarðar skúla.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 19. mai 2011, og mælir nevndin býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá mentamálanevndini um at veita eina eykajáttan upp á kr. 125.000,00 sum íløga í øki 4: "Undirvísing", hetta sambært § 41, stk. 1 og 2 í kommunustýrislógini.

Vísandi til § 41 stk. 2 í omanfyri standandi lóg verður mælt býráðnum til, at eykajáttanin til keypið verður fíggjað av rakstrarstaði 20.52.11.530.01 "Partafelagsskattur" konto 618000.
Grundgeving nevndarinnar fyri nevndu fígging er, at á samtyktu fíggjarætlan kommununar fyri 2011 eru avsettar kr. 3,0 mió., men sambært teimum upplýsningum og staðfestingum, sum fíggjarnevndin hevur fingið, so kemur partafelagsskatturin at verða væl hægri enn mett, eitt nú við úrslitinum hjá P/F Havsbrún sum grundarlagi.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælunum frá mentamálanevndini og fíggjarnevndini og beina málið til 2. og endaliga viðgerð, hetta sambært § 41, stk. 2 løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri. (8-0).

## Mál nr. 14/2011.

### Mál viðvíkjandi rudding.

Havnanevndin hevur á fundi tann 19. mai 2011 tikið avgerð um at heita á býráðið um at taka eina prinsipiella støðu um uppurudding og burturbeining av lutum á niðanfyri nevndu økjum:

- Ídnaðarøkinum á Kambsdali.
- Grótbrotinum á Brúnarenda.
- Úti á Klovningi.
- Í Gamla grótbrotinum uttan fyri Breiðá.
- Á havnarøkinum.

**Avgerð:**
Samtykt varð prinsipielt at taka undir við málinum frá havnanevndini um uppurudding og burturbeining av lutum omanfyri nevndu økjum. (8-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 18.45.

Dánjal Vang

Gordon M. Petersen

Elisabeth D. Eidevig

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Magnus Midjord

Sonni á Horni

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen